## Søga um at hava tað ringt

Tey ungu fáa nú møguleika at siga sína egnu søgu, og um hvat tey halda eigur at verða gjørt fyri at hjálpa. Føroyskir skúlaungdómar eru bjóðaðir at luttaka í skrivikapping, har møguleiki verður við egnum orðum at lýsa, hvussu ung í Føroyum hava tað, tá ið tey hava tað ringt, og hvat tey sjálvi ynskja, at tað verður gjørt fyri at hjálpa teimum. Kappingin er skipað í trimum bólkum: 13-14, 15-16 og 17-18 ára gomul. Tvær virðislønir eru til hvønn bólkin. 1. virðisløn er 5000 krónur, og 2. virðisløn er 2000 krónur. Tað er Tóra Petersen, sálarfrøðingur á Psykiatriska deplinum, sum stendur fyri kappingini saman við tveimum læraralesandi, Louisu Johnsdóttir og Hans Fróða Jensen. Skúlarnir hava fingið upplýsandi tilfar um skrivikappingina sendandi. Seinasta freist at lata inn er 15. november



# Svóvu umborð meðan skipið lá á Havnini

**Norrøna kom á Havnina úr Hanstholm og Bergen stutt eftir midnátt í gjárkvøldi, men ferðafólkini sluppu ikki í land fyrr enn klokkan 06 í morgun. – Fyri okkum er tað líka mikið, um skipið verður tollavgreitt eftir midnátt ella klokkan 06, sigur yvirtollarin, Kjartan D. Joensen**

SIGLING
*Vilmund Jacobsen*
*Vilmund@sosialurin.fo*

Tað er komið fyri av og á, tá Norrøna kemur úr útlandinum til Føroya, at skipið kemur fyrr enn ásettu tíðina. Í slíkum føri er orsøkin hon, at Norrøna hevur siglt eftir framskundaðari ferðaætlan vegna veður.

Endamálið við hesum er, at ferðafólk skulu fáa eina so behagiliga ferð sum gjørligt.

Hetta hendi á seinastu ferðini hjá Norrønu úr Hanstholm um Bergen til Føroya.

Norrøna kom á Havnina stutt eftir midnátt síðstu nátt, men hvørki ferðafólk ella farmur sluppu í land fyrr enn klokkan 06 í morgun.

Nógvum dámar væl hesa skipan, kanska serliga teimum, sum kortini skulu út á bygd. Sambært ferðaætlanini skuldu tey kortini ikki verið á Havnini fyrr enn klokkan 06.

Men tað eru eisini tey, sum halda tað vera eitt sindur undarligt at skula leggja seg at sova umborð á Norrønu við havnarkai, tá tey síggja niðan á húsini hjá sær uppi í býnum.

### Ikki Tollvaldið

Mong halda ivaleyst, at tað er prísurin fyri tollavgreiðslu, sum reiðaríið noyðist at rinda, ið skilir partarnar og leggur eykaútreiðslur á felagið, um skipið verður tollavgreitt í úrtíð og náttartíð.

Men soleiðis er tað ikki.

Kjartan D. Joensen, yvirtollari, sigur, at valið hjá Smyril Line at lata ferðafólkini sova umborð til næsta morgun einki hevur við tollvaldið, ei heldur prísin fyri avgreiðslu, at gera.



Ferðafólkini, sum komu úr Hansholm og Bergen við Norrønu síðstu nátt, høvdu tað gott og svóvu trygt, meðan tey bíðaðu eftir at sleppa í land í morgun

- Tað er soleiðis, at reiðaríir gjalda fyri tollavgreiðslur uttanfyri vanliga arbeiðstíð, sum er yrkadagar millum klokkan 8 og 16.30 eins og fyri avgreiðslur leygardag og sunnudag.

Hann vísir á, at eingin munur á kostnaðinum, um skipið verður avgreitt klokkan 01 mánanátt ella mánamorgun klokkan 06.

- Í báðum førum er hetta uttanfyri okkara vanligu arbeiðstíð, og tí noyðist reiðaríið at rinda kostnaðin fyri avgreiðsluna.

Kjartan M. Joensen vísir á, at skipanin við tollavgreiðslu er ásett í kunngerð, og prísurin er hin sami, antin tænastan fer fram beint eftir vanliga arbeiðstíð – ella á nátt.

- Vit hava eitt fast gjald fyri hesa avgreiðslu, og tí hevur tað ongan týdning fyri kostnaðin, hvør tíð á samdøgninum tænastan fer fram, leggur hann aftrat.



*- At ferðafólkini við Norrønu, sum komu á Havnina stutt eftir midnátt í gjárkvøldið, ikki sluppu í land fyrr enn klokkan 06 í morgun, hevur einki við tollpartin at gera, sigur yvirtollarin, Kjartan D. Joensen*

### Tykist skilagott

Yvirtollarin sigur, at í morgun vóru trý fólk til arbeiðis á bryggjuni, men vanliga eru upp í eini seks fólk tøk til avgreiðsluna, tá Nørruna kemur.

- Tá eitt slíkt skip skal avgreiðast, er talan bæði um ferðafólk, sum koma av skipinum og inn í móttøkuhøllina og um farm og bilar, sum fara út á dekkinum.

Kjartan D. Joensen sigur, at Tollvaldið eisini var til reiðar at avgreiða Norrønu á midnátt í gjárkvøldið, um Smyril Line hevði ynski um tað.

- Hetta hevur tí einki við tollpartin at gera. Vit eru til reiðar, tá vit skulu verða á staðnum, sigur yvirtollarin, sum annars heldur, at skipanin við, at fólk í slíkum føri liggja náttina yvir umborð á Norrønu, í mangar mátar tykist skilagóð.

# Føroyingar eru ógvuliga forstáiligir

**Sølu-og marknaðarleiðarin á Smyril Line, Jákup Sverri Kass, sigur, at avgerðin um at bíða við at lata ferðafólkini sleppa í land á Norrønu síðstu nátt, varð tikin við atliti til veðurlíkindini og tíðina á samdøgninum**

SIGLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit noyðast at laga okkum eftir veðurlíkindunum, og vit royna altíð at skipa so fyri, at siglingin tænir teimum ferðandi best. At ferðafólkini við Norrønu, sum var á Havnini stutt eftir midnátt í gjárkvøldið, ikki sluppu í land fyrr enn klokkan 06 í morgun, var ein heildarmeting, sum í fyrsta lagi bygdi á veðurlíkindini og tíðina á samdøgninum.

Tað sigur Jákup Sverri Kass, sølu-og marknaðarleiðari á Smyril Line.

Hann vísir á, at sambært ferðaætlanini skuldi Norrøna ikki vera á Havnini fyrr enn klokkan 06 í morgun, men orsakað av, at fráferðir úr ávikavist Hanstholm og Bergen vórðu framskundaðar, var skipið á Havnini stutt eftir midnátt.

- Sum heild eru føroyingar ógvuliga forstáiligir, tá vit noyðast at laga okkum til veðurlagið. Tað er altíð onkur, sum ikki er so væl nøgdur, men hinvegin eru tað mong, sum í slíkum føri eru fegin um at sleppa at sova náttina umborð og sleppa úthvíld í land til ásettu tíðina morgunin eftir.

Jákup Sverri sigur, at útlendingar ikki altíð eru eins forstáiligir og føroyingar, ið kenna til skiftandi veðurlag og neyðugar tillagingar, sum altíð eru til frama fyri ferðafólkini.

- Í slíkum føri vil Tollvaldið ikki, at bert ein partur av skipunum verður tollavgreiddur. Teir vilja, at alt fer fram í senn, og tí er tað í slíkum føri sum hesum einfaldast og lættast fyri allar partar at bíða við avgreiðsluni, sigur sølu-og marknaðarleiðarin á Smyril Line.



*- Fólk eru sum heild forstáilig, tá veður og vindur gera tað neyðugt at fremja broytingar, sigur Jákup Sverri Kass, sølu-og marknaðarleiðari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*